# Framferðin hjá Annlis er til óbótaligan skaða

**–Tað er heilt burturvið, at ein landsstýrismaður fer eftir embætisfólki fyri opnum skermi, sigur løgmaður**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*

Framferðin hjá Annlis Bjarkhamar í sambandi við málið um landsantikvarin er til óbótaligan skaða.

Tað sigur Annfin Kallsberg, løgmaður.

Hann var greiður, tá ið hann svaraði fyrispurninginum frá Katrin Dahl Jacobsen, sum vit hava umrøtt í hinari greinini her á síðuni.

Hann legði dent á, at orsøkin til, at hann ikki hevði tikið støðu í málinum enn, hóast tað var fjurtan dagar gamalt, var ikki tí at hann hevði góðkent tað, sum var farið fram.

Men tað er ikki meiri enn ein vika síðani, at hann hevði fingið alt tilfarið í málinum og hann var sostatt ikki liðugur at viðgera málið enn.

Tá ið hann verður liðugur, verður ein niðurstøða gjørd og so verður hon kunngjørd.

Hann vónaði, at tað bleiv í hesi vikuni, ella fyrst í komandu viku.



*– Hevur ein landsstýrismaður nakað at seta niður á síni starvsfólk, eigur hann at gera tað á røttum stað, við rætta viðkomandi. Tað skal ikki gerast alment, sigur Løgmaður, sum átalar framferðina hjá Annlis Bjarkhamar*

### Átaluvert

Annars var løgmaður púra samdur við tey bæði javnaðarfólkini um at framferðin í hesum máli var átaluverdur.

– Vit fingu ein setanarpolitikk fyri at hava greiðar mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, tá ið fólk verða sett í alment starv.

– Endamálið við setanarpolitikkinum er, at øll, sum søkja eitt alment starv, skulu kenna seg vís í, at alt fer rætt fram.

– Men endamálið er eisini, at tey, sum eru best skikkað eftir lýsingini um starvið, verða sett í starvið.

– Og tað er til óbótaligan skaða fyri alla politisku skipanina, at ein landsstýrismaður hevur setanarsamrøður, tí tá kann tað javntsetast við eina politiska setan.

Løgmaður segði, at tað er heilt óvanligt, fyri ikki at siga eindømi, at ein landsstýrismaður hevur setanarsamrøður, tá ið eitt starv skal setast og tað er ikki í samsvari við almenna setanarpolitikkin.

Han sitpar til, at Annlis Bjarkhamar hevði setanarsamrøður við teir báðar umsøkjararnar til starvið sum landsantikvar, uttanum setanarnevndina.

### Hoyrir ongastaðni heima

Hann gav eisini Katrin Dahl Jacobsen rætt í, at tað hoyrdi ongastaðni heima, at landsstýrismaðurin hevði funnist at sínum embætisfólki alment.

– Landsstýrismaðurin hevur eisini ábyrgdina av sínum ráðið og teimum starvsfólkum, sum eru har.

– Hevur ein landsstýrismaður nakað at seta niður á nøkur av sínum starvsfólkum, eigur hann at gera tað á røttum stað fyri rætta viðkomandi.

– Tað má vera gott samstarv ímillum tað umsitingarliga, sum embætisfólkini umboða, og tað poltitiska, sum landsstýrismaðurin umboðar

– Ganga hesi bæði ikki hond í hond, fæst ikki tað burturúr eini fyrisiting, sum eigur at vera av einum málsøki og tað er eftir míni meining, sera, sera álvarsligt, segði løgmaður.

# Óloyal ímóti sínum egnu starvsfólkum

**Tað sær út til, at landsstýrismenn kunnu gera, sum teimum lystir, hóast greiðar mannagongdir eru, sigur Katrin Dahl Jacobsen**

LANDSANTIKVARURIN
*Aki Bertholdsen*

Málið um setanina av nýggjum landsantikvari hevur enn einaferð verið til umrøðu í Løgtinginum mikudagin.

Tað var Katrin Dahl Jacobsen, løgtingslimur fyri javnaðarflokkin, sum aftur mikudagin spurdi Løgmann um setanina av landsantikvari.

Hon minti á, at Løgmaður hevði lovað at kanna málið til botns. Men síðani var onki hent.

Hon vildi tí hava at vita, um hetta skuldi takast so, at Løgmaður hevði góðtikið tað, sum var farið fram.

Hon vísti eisini á, at Magistarafelagið hevði mælt til, at starvssetanin varð afturtikin og at starvsfólkið á fornminnissavninum hevði mómtælt.

Men hon vildi eisini hava at vita frá løgmanni, um hann góðtók, at Annlis Bjarkhamar hevði funnist at embætisfólki í mentamálaráðnum alment, eins og hon gjørdi í Degi og viku 10. februar.

Tá fortaldi Annlis Bjarkhamar fyri øllum Føroya fólki, at arbeiðið hjá setanarnevndini var ikki nóg gott og so kann spurnartekin setast við rættartrygdina hjá almennum starvsfólkum.

Hon helt, at tað var ógvuliga vánaligt, at tað skuldi bera til hjá einum landsstýrismanni at vera so óloyalur ímóti síni egnu umsiting.

### Ein politisk setan

Andreas Petersen, løgtingsmaður vísti á, at setanarpolitikkurin hjá tí almenna var greiður.

Men tá ið so ein landsstýrismaðurin setir embætisverkið til síðis og sjálvur hevur setanarsamrøður við umsøkjarar, lyftir hann málið upp á eitt politiskt støði. Sostatt verður talan um eina politiska starvsseting.

– Og tað er harmiligt, legði hann afturat.

Tað, hann sipar til, er, at Annlis Bjarkhamar sjálv kallaði Símun Arge og Steffen Summan til setanarsamrøðu, uttanum setanarnevndina.

Katrin Dahl Jacobsen helt, at talan var um eitt politiskt mál, tí endamálið við stýrisskipanarlógini var at lyfta umsitingina upp á eitt støði, har alt skuldi fara rættvíst fram, men kortini tóktist sum um landsstýrismenn kundu gera, sum teimum lysti- so leingi talan ikki var um lógarbrot.



*– Tað er ógvuliga vánaligt, at tað skal bera til hjá einum landsstýrismanni at vera so óloyalur ímóti síni egnu umsiting, sum Annlis Bjarkhamar hevur verið, sigur Katrin Dahl Jacobsen*



# Skúlaútbygging í Kvívík

**Kvívíkar Kommuna hevur hækkað skattaprosentið fyri at kunna byggja skúlan út. Eisini aðrar útbyggingar verða gjørdar í kommununi**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*



*Kvivíkar Kommuna hækkaði skattaprosentið við tveimum stigum fyri at fíggja skúlaútbyggingina, sigur Heini Holm, borgarstjóri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Kvívík:** Kvívíkar skúli verður bygdir út, so hann stendur liðugur um gott trý ár. Nýggjur frítíðarskúli letur upp í Kvívík, og nýggj kloakkskipan verður løgd á Válinum.

Hesi eru nøkur av málunum, Kvívíkar Kommuna arbeiðir við i løtuni, sigur Heini Holm, borgarstjóri í Kvívík.

Skúlaútbyggingin kostar nógvar pengar, sigur hann, so bygdarráðið sá seg noytt at hækka skattaprosentið frá 17 upp til 19 prosent í tvey ár fyri at fáa til vega tríggjar milliónir krónur, sum brúkast skulu til endamálið.

Arbeiðið, sum gjørt verður, umfatar umvæling av verandi skúla, umframt at bygt verður uppí. Miðað verður eftir at hava arbeiðið liðugt til skúlaársbyrjan á sumri 2005, sigur Heini Holm.

Við at hækka skattaprosentið hevur bygdarráðið tryggjað sær, at arbeiðið upp á skúlan verður goldið, so hvørt tað verður gjørt, soleiðis at skúlin er útgoldin, samstundis sum hann er liðugur.

Kvívíkar Kommuna hevur eisini eina frítíðarskúlaskipan, sum nú verður ment, greiðir borgarstjórin frá.

Frítíðarskúli hevur verið í gomlu bankahúsunum beint við høvuðsvegin oman í bygdina. Tað hevur ikki verið nóg gott soleiðis, heldur Heini Holm. Bæði orsakað av plássinum og ikki minst av ferðsluni.

Nú hevur kommunan keypt eini eldri setús niðri við kirkjuna í sera barnavinarligum umhvørvi, sigur hann. Bein við ánna, og eingin ferðsla er heldur. Har fer at verða pláss fyri 16 børnum. Tey elstu úr barnagarðinum fara oman hagar, umframt tey, sum í dag eru í frítíðarskúlaskipanini.

Hóast Kvívíkar Kommuna ikki er millum tær størstu í íbúgvaratali, telist hon millum tær heilt stóru í vídd. Frá Skælingsfjalli norður á Sneis, vísir Heini Holm á. Og tað eru ikki færri enn fimm bygdir í kommununi, sum hvør skal hava sítt vatnverk. So har er nóg mikið at halda, sigur hann.

Vatnverkið á Válinum við reinsiverki og øllum er nýtt. Og tað sama er bæði á Stykkinum og á Skælingi.

Í Leynum er byggisamtyktin broytt, soleiðis at til ber at byggja nøkur sethús afturat fram við landsvegnum til Skælings, sigur borgarstjórin, onkur umsókn er, men einki loyvi er givið enn.

Í Kvívík hevur hinvegin veirð gjørt byggiklárt nú í eini tvey ár Norðuri á Heygnum. Nú eru skeytini farin út, og eini try hús eru komin upp at standa har norðuri, sigur Heini Holm.

Hann sigur, at peningur er eisini settur av til at flyta ruskbingjurnar, sum standa niðri í bygdini, niðan móti molddunganum, sum liggur niðan móti Vestmannavegnum.

Í dag standa ruskbingjurnar niðri við útgrevsturin, og haðani vil bygdarráðið hava tær burtur. Samstundis verður meira skipað innsavning gjørd á nýggja bingjuplássinum, sigur borgarstjórin.

Heini Holm sigur, at Kvívíkar Kommuna er rímilig væl fyri fíggjarliga. Kommunan varð skuldarfrí í 1999, men væntar sær eina hampiliga inntøku frá landskassanum í ár.

Tá Kvívíkar Kommuna í 1997 gjørdi barnagarð, legði hon allan kostnaðin út sjálv. Talan var um 1,7 millión krónur. Reglurnar vóru tá, at landskassin skuldi gjalda 60 prosent, so kommunan skuldi fáa eina millión aftur. Avtalað varð gjørd og undirskrivað, men peningurin ikki útgoldin.

Síðan er barnaansing løgd út á kommunurnar, og Kvívíkar Kommuna hevur fingið at vita, at hon má sjálv bera kostnaðin av barnagarðinum.

– Men tað verður ikki gjørt uttan svørðslag, sigur Heini Holm, borgarstjóri í Kvívík. vit kunnu ikki bøta fyri, at reglurnar verða broyttar aftaná, at vit hava undirskrivað eina avtalu. Hon skal bara haldast, sigur hann.

# Vesturland vendi heimaftur

**Garnaskipið Vesturland, sum hósvíkingar løgdu smíðað í Havn í 1970, er nú aftur keypt til Hósvíkar og fær sama VN nummarið, sum skipið hevði av fyrstan tíð**

SKIPAKEYP
*Edvard Joensen*

Vesturland er nú aftur skrásett í Hósvík. Tað er felagið Thor, sum hevur keypt skipið frá Kristiani J. Jacobsen á Eiði.

Gunnbjørn Joensen, reiðari, sigur, at skipið fer framhaldandi at fiska havtasku við gørnum undir Føroyum. Tað hevur gingið hampiliga væl við tí fiskiskapinum, og teir vænta, at tað fer at halda við. Mestsum alt fólkið fylgir við skipinum. Tó verður nýggjur skipari, sigur Gunnbjørn Joensen. Hann hevur ikki hug at siga, hvat skipið kostaði, nú tað varð keypt til Hósvíkar.




*Vesturland, sum fyri reiðiliga 30 árum síðan varð smíðað til Hósvíkar, er nú aftur skrásett við sínum gamla nummari í Hósvík*

Vesturland er smíðað á Tórshavnar Skipasmiðju í 1970 og varð tá skrásett í Hósvík. Tá var skipið merkt VN 307, og nú tað er afutr komið til Hósvíkar, fær tað sama nummarið, sigur Gunnbjørn Joensen.

– Hetta er líkasum eitt sindur av søgu, sigur hann, tí Vesturland er vist einasta skip, sum í nýggjari tíð er smíðað til Hósvíkar.

Reiðaríð hjá Vesturlandi, Thor, hevur við Vesturlandi átta skip í vinnu. Seks eru í frálandavinnuni, meðan eitt teirra, sum eisini eitur thor, roynir við gørnum eftir svartkalva undir Føroyum.

Partafelagið Thor fer í næstu viku at flyta í nýggj høli á havnarlagnum í Hósvík. Felagið hevur bygt ein nýggjan bygning, sum fer at hýsa bæði skrivstovuni umramt goymslurúmum.